


Nimbus eru danskar motorsúkklur, sum vórðu gjørdar frá 1919 til 1959



*Súkklurnar vórðu eftirhugdar, og onkrar umvælingar vórðu gjørdar*



*Ingun Olsen í Runavík kom við sínari Mimbus Sport frá 1939*



*Hendan flotta Nimbus hjá Jóa Joensen kom úr Klaksvík*



*Preben G. Herskind serfrøðingurin í Nimbus motorsúkklum*

# Nimbus dagur yviri við Strond

ELLISAKFØR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í sambandi við at danski serfrøðingurin í Nimbus motorsúkklum, Preben G. Herskind frá PHs Nimbus Service í Holbæk, vitjaði í hølunum hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør yviri við Strond leygardagin 8. august, var skipað fyri einum sonevndum Nimbus tiltaki, har fleiri Nimbus eigarar kring landið komu við sínum motorsúkklum og fingu tær eftirhugdar. Preben G. Herskind er sjálvur mekanikari, og hann eftirhugdi súkklurnar, gjørdi onkrar umvælingar og kom við góðum ráðum.

Nimbus eru danskar motorsúkklur, sum vórðu gjørdar frá 1919 til 1959. Árið í ár er annars eitt runt ár í søguni hjá Nimbus. 90 ár eru liðin síðan framleiðslan byrjaði í 1919 við tí fyrstu Nimbus, sum fekk kelinavnið "Kakkelovnsrøret". Hesar vórðu framleiddar til umleið 1928, tá framleiðslan av Nimbus fyribils helt uppat. Fyri 75 árum síðan, í 1934, byrjaði framleiðslan av Nimbus aftur við nýggjum modelli, sum fekk kelinavnið "Humlebien". Hendan varð gjørd í 25 ár - til 1959. Sostatt eru 50 ár liðin síðan framleiðslan av Nimbus endaliga helt uppat.

Nimbus vórðu nógv brúktar av danska herinum, politinum og postverkinum.

Í dag eru umleið 4.500 Nimbus motorsúkklur í Danmark. Í Føroyum verður roknað við, at umleið 20 Nimbus eru kring um í landinum. Nimbus vórðu gjørdar á somu verksmiðju, sum framleiddi teir kendu Nilfisk dustsúgvararnar. Í dag er tað Nilfisk-Advance A/S, sum framleiðis Nilfisk.

Heimasíðan hjá PHs Nimbus Service er: www.nimbus-service.dk